# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar

25. apríl fingu Gunnvør á Norði, Miðvági, og Jóhan P. Poulsen, Klaksvík, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3700 gr.

28. apríl fingu Annbritt Brynjolvsdóttir, Hoyvík, og Jan Thomsen, Klaksvík, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3400 gr.

29. apríl fingu Anelia og Justin Philbrow, Toftum, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3450 gr.

1. mai fingu Lis og Jógvan Absalonsen, Vági, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3800 gr.

2. mai fingu Jacobina Thomsen og Páll Magnar Kjærbæk, Sumba, ein son. Hann var 58 cm langur og vigaði 4350 gr.

2. mai fingu Sigrun Davidsen og Hákun Steingrímsson, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3350 gr.

3. mai fingu Ioana og Daniel Rapa, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 3750 gr.

3. mai fingu Linda Kjærbæk, Hvítanes, og Ólavur Hansen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3900 gr.

4. mai fingu Mirjam og Kári Vitalis, Klaksvík, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3800 gr.

5. mai fingu Sóley Einarsson, Lamba, og Jóhan á Lava Sundskarð, Klaksvík, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3450 gr.

6. mai fingu Eyðbritt Højgaard og Rúni Petersen, Saltangará, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4100 gr.

7. mai fingu Beinta Rubeksen og Uni Wardum, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3350 gr.

7. mai fingu Fía Ellingsgaard og Jóhan Fossdalsá, Nesi, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3750 gr.

8. mai fingu Sonja og Finn Steinhólm, Toftum, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3600 gr.

8. mai fingu Maria Svabo Hansen og Kári Hansen, Argjum, ein son. Hann var 57 cm langur og vigaði 4500 gr.

9. mai fingu Marian á Borg og Bogi Midjord, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 2950 gr.

## Andlát

**30. apríl**
Ansa Djurhuus, Tórshavn, ættað av Stykkinum, 89 ár.
Ísak Matras, ættaður av Norðoyri, 73 ár

**1. mai**
Pól Justinussen, í Klaksvík, ættaður úr Svínoy, 84 ár

**2. mai**
Louisa Williamsdóttir, Oyrabakki, 73 ár

**3. mai**
Helvin Randrup, Hvalba, búsitandi í Havn, 38 ár

**4. mai**
Mina Poulsen, Viðareiði, bús. í Roskilde, 87 ár
Hjalmar Ludvig, Fámjin, 96 ár

**6. mai**
Hanus Højsted, Svínáir, 57 ár

**7. mai**
Gunhild Rasmussen, Sandav., 90 ár

# Minningarorð um Annie ommu

*Okkar allarbesta*
*er nú farin á sína "siesta"*
*Hon er farin til tað heilaga stað*
*og er uttan iva glað*

*Her hjá okkum er tað tømt*
*tí tú hevur okkum aldrin forsømt*
*Frá tínum kærleika vit kunnu læra*
*og minnast alt tað kæra*

*Hóast tú vart sjúk í mong ár*
*lekti tú altíð okkara sár*
*Líkamikið hvat tað var*
*hevði tú altíð eitt svar*

*Tú vart altíð so erlig*
*og fyri okkum heilt serlig*
*Altíð var ein hjálpandi hond*
*bæði í fjar og í nánd*

*Góða elskaða omma, tú helt altíð á*
*hóast tær sorgir tú mátti sjá*
*Sum einsamøll móðir*
*tú passaði tínar slóðir*

*Upp til tín vit hyggja*
*hvat so í lívinum vit byggja*
*Tú ert ein góð fyrimynd*
*sum rakk mangan tind*

*Tað er so stórur saknur í tær*
*hjá okkum sum stóðu tær so nær*
*Vit mugu royna at verða glað*
*tí vit vita at tú er komin eitt gott stað*

Hvíl í friði góða omma

**Gunnleyg**

# Bjarta Mortensen

## Tvøroyri
## til minningar

**f. 18.08.1962 d. 23.03.2003**

So fór hann um sýnina, um tað liðið, ið bert gongur tann eina vegin. Tú var alt ov ungur at fara. Hvussu long lívsleið er einum tillutað, vita vit ikki. Orðini, sum prestur segði, eru røtt. Tað er ikki spurningurin um longdina av lívinum, men innihaldið, tað, ið ein fremur. Lívið er ein Guds gáva, eitt lán, sum vit sjálv, hvør á sín hátt, eiga at varða um. Lívsleiðin er ymisk, hjá nøkrum røkkur hon til ellisár, og hjá øðrum er hon stutt.

Soleiðis var hjá vini mínum Bjarta. Bert 40 ár, so var hansara skeið runnið. Best sum sólin fagrast skínur, deyðin inn um dyrnar trínur.

Bjarti var sjúkur í nógv ár, men eftir skurðviðgerð vóru vónirnar góðar. Men so bleiv ikki, sum áður sagt, tað eru ikki tey nógvu árini, men hvussu ein ger brúk av tíðini, einum er tillutað.

Bjarti arbeiddi hjá R. B. Thomsen í nógv ár. Ein álitismaður, har vísti hann í verki sína dygd. Meðan hann var virkin gjørdi Bjarti eitt stórt felagsarbeiði, ikki í fremstu røð, men aftanfyri, har ikki altíð er so lætt. Men áhugin drívur verkið. Bæði Róðrarfelagið og TB vóru hansara, men sjálvandi stóð TB honum næst. Har var hann altíð tøkur til hjálpar, ikki har sum gullkrónurnar vóru, men har sum grundarlagið fyri heiðursmerkini var lagt. At tað er brúk fyri slíkum monnum, er sjón fyri søgn. Tey, sum uttan at standa í fremstu røð, gera eitt megnar felags arbeiði. Bjarti gjørdi tað.

Men sjúkan nívdi, og dagarnir gjørdust tyngri. Men tað, sum lætti um var, at hann og Sonny funnu saman, giftust og fingu nøkur góð ár saman. Sonny var tann stjørnan, ið lýsti, tá ið myrkast var. Hon var um hann og gjørdi lívið lættari.

Tað var ikki longdin, men innihaldið, og tú gav meira enn tú hugsaði um. Vit fara at minnast teg fyri tað tú var. Fyrst av øllum var tú tvøramaður. Heimbygdin stóð tær næst, tú gav títt til menning og styrki, har tað stóð á. Tað er tungt at skiljast, men veruleikin er tann, at við føðingini er deyðin knýttur. Hetta var tær greitt, tí tú úr barnaheimi tínum, frá mammu og pápa, tey høvdu lagt tær hetta á hjarta. Tey vístu tær, hvønn tú skuldi seta títt álit á. Hann, sum øllum ræður.

*Tú lærdi títt Faðirvár*
*Lít tú bert á títt Faðirvár*
*lat teg ei fet frá tí víkjast*
*Himmal og jørð í smildur gár*
*aldrin tó Faðirvár strikast*

Hetta lívsgrundarlag fekk tú sum barlast úr barnaheiminum.

Góði vinur, nú hevur tú fingið hvíld og frið. Tíðin vil lætta um sorgina og saknin, ongantíð verður gloymt tað, sum hendi á lívsferðini.

Tvørasangurin varð sungin á gravarbakka, ikki so løgið, heimbygdin og fólkið her var títt alt og eitt. Seinasta heilsanin var ein viðurkenning av tí, tú stóðst fyri.

*Tí urtin trívist best*
*har rótin rann*

At tú vart virdur, vísti tað stóra fylgið, har eisini umboð og vinir frá fleiri ítróttarfeløgum vóru hjástaddir. Tað vísti, at vinabond røkka longur enn til bara kapping.

*Tú leiðari góður ábyrgd hevði*
*trygdin á ítróttarferð á teg legði*
*ferðingar góðar gott var lagið*
*TB kom heim sigurskvæði*
*kappróður ikki gloymdi tú*
*neystið var samlingsstaðið*
*Tvøroyri á odda trygga havn*
*bygdin vakra lá fyri stavn*
*tú gjørdi títt besta at inna*
*málið var á odda at vinna*
*tú var ein sum við orði stóð*
*tað er leiðin ið haldast má góð*
*nú rísur sól fjøllini grønkast verja borg*
*stoltleiki teirra doyvir tunga sorg*
*várið boðar at tað blómar og grør*
*hvíl tryggur við Tvøroyrar fjørð*

Sverre

## Dagurin

**10. mai. Gordianus,** deyður í umleið 362. Heiðin rómverskur embætismaður, sum gjørdist kristin og varð hálshøgdur.
**11. mai. Mamertus,** deyður í 475. Biskupur í Suðurfraklandi; tikin av døgum.
**12. mai. Pancratius,** deyður í umleið 300. 13 ára gamal drongur, sum varð tikin av døgum fyri trúar sakir.